# Fíggjarmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 18. desember 2025 |
| Mál nr.: | 25/14821 |
| Málsviðgjørt: | EC |
| Ummælistíð: | 17. september til 30. oktober 2025 |
| Eftirkannað: | 12. desember 2025 |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan**
(Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri, fígging av inntøkubroytingum og løguætlan)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan, sum broytt við løgtingslóg nr. 23 frá 18. mars 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 7 verður sum kapittul 1 a sett:

"**Kapittul 1 a**
**Fíggjarpolitisk mál**

**§ 7 a.** Fíggjarlógin kann ikki hava rakstrarútreiðslur, sum tilsamans eru meira enn 1% hægri enn rakstrarútreiðslurnar undanfarna ár, framskrivaðar við lønarvøkstri og prísvøkstri sambært skjali 1.
*Stk. 2.* Rakstrarútreiðslur fevna ikki um játtanarsløgini:
1) Ógreinað játtan,
2) løgujáttan, og
3) stuðulsjáttan, ið er eyðmerkt at vera løgukend.
*Stk. 3.* Fíggjarmálaráðið almannakunnger 1. mars og endurskoðar 1. september hámark fyri, hvussu stórur vøksturin í rakstrarútreiðslunum sambært stk. 1 kann vera í prosentum fyri komandi ár.
*Stk. 4.* Búskaparráðið kannar eftir og boðar frá alment, um vøksturin í rakstrarútreiðslunum er í samsvari við hámarkið í stk. 3.
*Stk. 5.* Er boðað frá sambært stk. 4, at vøksturin í rakstrarútreiðslunum er hægri enn hámarkið, skal landsstýrisfólkið í fíggjarmálum innan ein mánað eftir fráboðanina leggja uppskot fram, soleiðis at vøksturin í rakstrarútreiðslunum er í samsvari við hámarkið.

**§ 7 b.** Í tann mun inntøkur frá skatti ella avgjaldi verða minkaðar við løgtingslóg, og samsvarandi inntøkur frá skatti ella avgjaldi ikki verða ásettar í løgtingslóg, verður munurin drigin frá í hámarkinum sambært § 7 a, stk. 3.

**§ 7 c.** Fíggjarlógin kann ikki hava løguútreiðslur, sum tilsamans eru hægri enn ásett í løguætlan fyri landið.

Løguútreiðslurnar fevna um játtanarsløgini:

1) Løgujáttan og
2) stuðulsjáttan, ið er eyðmerkt at vera løgukend.

*Stk. 2.* Løguætlanin fevnir um 10 ár. Tey fyrstu 3 árini galda verkætlanir, sum kunnu verða fyrireikaðar, projekteraðar og annars gjørdar klárar at koyra í útboð.

*Stk. 3.* Løguætlanin verður løgd fyri Løgtingið sum uppskot til samtyktar fyri 1. apríl á hvørjum ári."

**2.** Skjal 1 verður sett sum skjal í løgtingslóg nr. 42 frá 4. mai 2009 um landsins játtanarskipan.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Skjal 1**

**“Skjal 1**

## Framskriving av rakstrarútreiðslum

| Standardkonta | Heiti | Framskriving |
|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | Lønarvøkstur |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | Prísvøkstur |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | Prísvøkstur |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | Prísvøkstur |
| 17 | Avskrivingar o.a. | Prísvøkstur |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | Prísvøkstur |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | Prísvøkstur |
| 25 | Eftirlits- og umsjónargjøld | Prísvøkstur |
| 27 | Fakturering av tænastum frá KT landsins | Prísvøkstur |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | Prísvøkstur |
| 51 | Tilskot til útlandið o.a. | Ongin framskriving |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | Javning |
| 53 | Stuðul til vinnu | Ongin framskriving |
| 54 | Stuðul til annað virksemi | Ongin framskriving |
| 55 | Íløgustuðul o.a. | Ongin framskriving |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | Ongin framskriving |
| 58 | Roknað renta | Ongin framskriving |
| 59 | Aðrar flytingarútreiðslur | Ongin framskriving |

**Lønarvøkstur:** Lønarvøkstur er sambært sáttmálum við Fíggjarmálaráðið fyri komandi ár. Er eingin sáttmáli fyri komandi ár, verður mett um lønarvøksturin út frá sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum og annars búskapinum.

**Prísvøkstur:** Prísvøkstur er prosentvísa broytingin í brúkaraprístalinum fyri seinast almannakunngjørda ársfjórðingin í mun til sama ársfjórðing árið fyri.

**Javning:** Javning sambært løgtingslóg um javningarprosent til almannaveitingar verður ásett í kunngerð í seinasta lagi 1. november. Er javningarprosentið ikki ásett, verður mett um talið.”

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum frá 22. desember 2022 stendur:

> *"Ábyrgdarfullur búskapar- og fíggjarpolitikkur skal tryggja vælferðina, og at okkara eftirkomarar arva eitt samfelag, ið er minst líka gott sum okkara, og sum byggir á haldføran og sjálvberandi búskap.*
>
> *Skil skal fáast á fíggjarstýringina, og búskaparpolitikkurin skal taka støði í nýggjari greining av búskaparliga haldføri Føroya. Samgongan skal á hvørjum ári taka miðvís stig, sum tryggja, at vit røkka langtíðarjavnvágini í búskapinum. Í breiðum politiskum semjum skulu vit tryggja búskaparliga haldførið og gera langtíðar rakstrar- og løguætlanir. Í hesum sambandi verður gjørt eitt fíggjarpolitiskt regluverk."*

Í januar 2024 læt Búskaparráðið úr hondum eina temafrágreiðing um fíggjarpolitiskt haldføri. Sambært frágreiðingini var ávísin fyri fíggjarpolitiska haldførið -9% av BTÚ. Tað merkir, at tað almenna, sum frá líður, hevur mett ósamsvar millum inntøkur og útreiðslur á 9% av BTÚ.

Ein høvuðsniðurstøða hjá Búskaparráðnum var, at førdi fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur, og at tænastustøðið á vælferðarøkinum vegna vaksandi tal av eldri fólki ikki kann verða bjóðað í framtíðini, uttan at nýskipanir verða framdar. Tilmælini snúðu seg um at:

- Hækka pensjónsaldurin
- Effektivisera eldraøkið
- Smíða eitt fíggjarpolitisk regluverk
- Minka um fráflyting

Landsstýrið arbeiðir við at fremja ymisk átøk og nýskipanir fyri at tálma útreiðslunum komandi árini, eitt nú at hækka pensjónsaldurin.

Fíggjarmálaráðið hevur arbeitt við at lýsa møguleikar fyri einum regluverki, sum skal tryggja, at skiftandi landsstýri ikki kunnu økja um útreiðslurnar ótálmað. Fíggjarmálaráðið hevur hugt eftir, hvørjar fyriskipanir eru, og hvussu tær hava roynst í grannalondunum. Hetta arbeiðið og stóra haldførisavbjóðingin hava sannført Fíggjarmálaráðið um, at neyðugt er við regluverki við fleiri streingjum, sum ávirka bæði politisku mentanina, og sum hava krøv um frágreiðing um haldføri, mestan útreiðsluvøkstur og avmarkingar í lántøku o.a.

Fíggjarmálaráðið gjørdi 1. juni 2023 innanhýsis upprit um fíggjarpolitiskt regluverk og hevur síðani arbeitt við ítøkiligum tilmælum. Nøkur teirra eru sett í verk:

- Lógin um Búskapargrunnin er broytt, soleiðis at tilfeingisinntøkur verða javnaðar yvir ár í fíggjarlógini
- Í rundskrivinum um lógarsmíð er ásett, at lógaruppskot o.tíl. skulu lýsa fíggjarligar avleiðingarnar av uppskotinum, eisini um 10, 20 og 30 ár, soleiðis at mett kann verða um samlaða vavið á uppskotinum
- Somuleiðis eigur kostnað-nyttu meting at verða gjørd av verkætlanum, sum eru upp á 100 mió. kr. ella meira; verkætlanir skulu altíð verða lýstar so væl sum gjørligt við teimum avleiðingum, tær hava við sær

- Búskaparráðið hevur útvegað ein haldførismyndil; myndilin verður mentur so hvørt fyri at gera so neyvar metingar sum møguligt á hvørjum ári

Arbeitt verður við øðrum tilmælum, t.d. at avmarka lántøku og at gera bygnaðarligt úrslit upp og áseta mál í tí sambandi.

Hetta uppskotið hevur til endamáls at tálma vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum, soleiðis at tær útreiðslurnar vaksa í mesta lagi 1% í mun til útreiðslurnar undanfarna ár, framskrivaðar við lønar- og prísvøkstri. Í tann mun inntøkur frá skatti ella avgjaldi verða minkaðar við lóg (netto), verður munurin drigin frá hámarkinum fyri, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar kunnu vaksa. Løguútreiðslurnar skulu vera í samsvari við løguætlan, sum Løgtingið samtykkir.

## 1.2. Galdandi lóggáva

Játtanarskipanin og lóggávan annars um fíggjarviðurskiftini hjá landinum hava – uttan tað at taka búskaparlig atlit, tá ið játtan verður brúkt – ikki ítøkiligar reglur um at tálma útreiðslunum.

Undanfarin ár hava skiftandi landsstýri tó ásett ella miðað eftir einum mesta prosentvøkstri í rakstrarútreiðslunum í uppskotinum til fíggjarlóg (nominelt). Tá er vøksturin roknaður sum samlaðar útreiðslur í fíggjarlógaruppskotinum – uttan løgujáttanir, løgukendar játtanir og útreiðslujáttanir undir § 20 inntøkur – í mun til samtyktu fíggjarlógina fyri undanfarna ár. Somuleiðis hevur landsstýrið gjørt eina løguætlan fyri nøkur ár, tá ið tørvur hevur verið á tí í sambandi við arbeiðið at gera uppskot til fíggjarlóg.

Búskaparráðið, Fíggjarmálaráðið og politiska skipanin ásanna, at verandi siðvenja, sum ikki er føst regluskipað, hevur nakrar vansar. Fyrst og fremst tí at siðvenjan sum so ikki er bindandi, og tí er eftirlit (revsing) ikki við, um ætlanir og avtalur verða fylgdar.

Ein spurningur er, hvat og hvussu tílíkar ætlanir og avtalur skulu stýra ella avmarka. Hvat er tað fyri útreiðsluhugtak, sum verður lagt til grund, og hvønn vøkstur skal talan vera um, t.d. nominelt ella realt og hvat áramál. Størsti vansin er nokk, at tað ikki er nøkur ætlan, sum snýr seg um at avmarka vøksturin í útreiðslunum hjá øllum tí almenna, undir hesum hjá kommunum.

Í Danmark er tað almenna fevnt av kravi um m.a. bygnaðarliga javnvág. Tað snýr seg um, at tað almenna ikki skal hava bygnaðarligt hall, sum er størri enn 1% av BTÚ. Bygnaðarligt úrslit er roknskaparligt úrslit, men sum er tillagað konjunkturum og serligum viðurskiftum.

Í Føroyum er enn ikki møguligt at gera bygnaðarligt úrslit upp fyri tað almenna ella landið sum so. Tað er tó eitt arbeiði, sum er í gongd sum partur av at skipa eitt fíggjarpolitiskt regluverk fyri tað almenna í Føroyum.

Skulu kommunurnar verða fevndar av fyriskipan at tálma útreiðslunum, krevur tað samráðingar við kommunurnar, umframt at neyðugt verður við ymiskum umskipanum, t.d. fyriskipan at hava eftirlit við rakstri og løgum hjá kommununum. Kommunurnar fara væntandi at hava stórar haldførisavbjóðingar komandi árini, og tað krevur tí, at partarnir síggja eitt regluverk í størri samanhangi og í mun til møguligar umskipanir av at fíggja almennu útreiðslurnar.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Uppskotið fevnir um fíggjarlógina og hevur sum endamál at seta hámark fyri, hvussu stórar útreiðslurnar hjá landinum til rakstur kunnu vera. Um inntøkur frá skatti ella avgjaldi verða minkaðar við lóg, og samsvarandi inntøkur frá skatti ella avgjaldi ikki verða ásettar í lóg, verður munurin drigin frá í hámarkinum. Eisini skulu løguútreiðslurnar vera í samsvari við løguætlan, sum Løgtingið samtykkir.

Uppskotið fevnir ikki um alt tað almenna; tað eru fyrst og fremst kommunurnar, sum ikki eru fevndar av fyriskipanunum í uppskotinum. Í fyrstu atløgu er ætlanin at fáa fyriskipanirnar at virka fyri landið. Arbeitt verður víðari við, hvussu og nær alt tað almenna kann verða fevnt av fyriskipanunum um rakstur, inntøkur og løgur.

Uppskotið snýr seg um mestan útreiðsluvøkstur hvørt árið. Ein møguleiki er, sum onkur lond gera, at krøv um javnvág ella vøkstur galda fyri nøkur ár. Tað kann vera smidligari við fleiri árum. Hildið verður tó, at tílík fyriskipan hevði verið torfør at umsita, serliga tí at hægri nýtsla í einum ári ávirkar komandi ár, har tørvur júst kann vera á hægri nýtslu, og at fyriskipanin hevði lagt bindingar á seinni samgongur. Løguútreiðslurnar eru ikki tongdar at hámarki í prosentum, sum rakstrarútreiðslurnar eru, men kunnu skifta eftir, hvussu gongur við byggiverkætlanunum.

Fíggjarmálaráðið skal almannakunngera mesta vøksturin í rakstrarútreiðslunum í prosentum á hvørjum ári, fyrst í mars í sambandi við játtanarkarmarnar, síðani endurskoðað í september í sambandi við uppskot til fíggjarlógina.

Uppskotið hevur ikki við sær beinleiðis krav um, at inntøkurnar til landskassan skulu vera so og so stórar. Men verður skatta- og avgjaldsgrundarlagið broytt við lóg, soleiðis at inntøkurnar (netto) verða minkaðar av teirri orsøk, verður munurin drigin frá í hámarkinum fyri, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar kunnu vaksa. Uppskot um t.d. skattalættar, hægri barnafrádrátt ella mvg-frítøkur skulu tí verða fíggjað við uppskotum um aðrar inntøkur, t.d. okkurt avgjald, ella við at lækka hámarkið fyri útreiðsluvøkstrinum.

Uppgávan hjá Búskaparráðnum er at veita óhefta búskaparliga ráðgeving og frágreiðingar um búskaparligu gongdina. Búskaparráðið kann t.d. meta um fíggjarlógina, átøk o.tíl. á hvørjum ári. Fyribils verður mett, at lógin um Búskaparráðið ikki skal verða broytt vegna broytingar í hesum uppskotinum.

Ætlanin er, at Landsgrannskoðanin í sambandi við t.d. játtanareftirlit, tá ið fíggjarárið er lokið, skal kanna eftir, um mørkini eru hildin. Støða verður tikin til, um neyðugt verður at regluskipa eftirlitspartin í lógini um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið snýr seg um at stýra rakstrarútreiðslunum, inntøkunum og løguútreiðslunum hjá landinum. Eitt hámark verður ásett fyri rakstrarútreiðslurnar í mun til undanfarna ár, svarandi til 1% vøkstur umframt framskrivaðan lønar- og prísvøkstur. Verða inntøkur frá skatti ella avgjaldi minkaðar við lóg (netto), verður munurin drigin frá í hámarkinum. Løguútreiðslurnar skulu vera í samsvari við løguætlan, sum Løgtingið samtykkir.

Uppskotið fevnir bara um fíggjarlógina í fyrstu atløgu. Arbeitt verður tó víðari við at fáa skipað regluverkið fyri alt tað almenna. Somuleiðis verður arbeitt víðari við øðrum tættum, t.d. um avmarkingar í lántøku og krav um bygnaðarliga javnvág.

Í talvuni niðanfyri sæst, at fíggjarlógin við øllum greinum er býtt upp í útreiðslusløg, nevnd standardkontur. Fíggjarlógin er eisini býtt upp í játtanarsløg. Í talvuni er dømi upp á útrokning av rakstrarútreiðslunum og hámarkinum.

| St. | Heiti | FL25 | Inntøkur og løgur | | | | Rakstur | % | Karm26 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | *Ógreinað* | *Løgur* | *Løgukent* | *Tils.* | | | |
| 11 | Lønir v.m. | 3.587.392 | | 10.000 | | 10.000 | 3.577.392 | 3,25 | 3.693.657 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 1.609.893 | 0 | 3.000 | | 3.000 | 1.606.893 | 0,67 | 1.617.659 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 152.538 | | 41.200 | | 41.200 | 111.338 | 0,67 | 112.084 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 269.682 | | 112.500 | | 112.500 | 157.182 | 0,67 | 158.235 |
| 17 | Avskrivingar o.a. | 320 | | | | 0 | 320 | 0,67 | 322 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 9.449 | 0 | 0 | | 0 | 9.449 | 0,67 | 9.512 |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | -850.725 | 0 | | | 0 | -850.725 | 0,67 | -856.425 |
| 25 | Eftirlits- og umsjónaravgjøld | -41.734 | -550 | | | -550 | -41.184 | 0,67 | -41.460 |
| 27 | Fakturering av tænastum frá KT Landsins | -44.100 | | | | 0 | -44.100 | 0,67 | -44.395 |
| 29 | Ymsar rakstrarinntøkur | -2.695 | -400 | 0 | | -400 | -2.295 | 0,67 | -2.310 |
| 31 | Bygging og løguframleiðsla | 343.100 | | 343.100 | | 343.100 | 0 | | 0 |
| 32 | Útvegan av løgu o.ø. | 15.400 | | 15.400 | | 15.400 | 0 | | 0 |
| 35 | Løgujáttan flutt frá síðsta ár | 0 | | 0 | | 0 | 0 | | 0 |
| 42 | Søla av løgu o.ø. | -33.100 | | -33.100 | | -33.100 | 0 | | 0 |
| 51 | Tilskot til útlandið o.a. | 58.677 | | | | 0 | 58.677 | | 58.677 |
| 52 | Tilskot til einstaklingar | 2.570.046 | | | | 0 | 2.570.046 | 2,71 | 2.639.694 |
| 53 | Stuðul til vinnu | 369.962 | 253.000 | | 12.000 | 265.000 | 104.962 | | 104.962 |
| 54 | Stuðul til annað virksemi | 172.140 | | 10.000 | 100 | 10.100 | 162.040 | | 162.040 |
| 55 | Íløgustuðul o.a. | 19.012 | | | 18.850 | 18.850 | 162 | | 162 |
| 57 | Rentuútreiðslur o.a. | 138.500 | 138.500 | | | 138.500 | 0 | | 0 |
| 61 | Skattur og avgjøld | -7.791.884 | -7.713.800 | | | -7.713.800 | -78.084 | | -78.084 |
| 62 | Kravd gjøld, bøtur o.a. | -91.234 | -61.950 | | | -61.950 | -29.284 | | -29.284 |
| 63 | Vanligar flytingarinntøkur | -45.760 | | -2.000 | | -2.000 | -43.760 | | -43.760 |
| 64 | Aðrar flytingarinntøkur | -12.200 | 0 | -3.800 | | -3.800 | -8.400 | | -8.400 |
| 65 | Flytingarinntøkur úr útlandinum | -638.867 | -571.800 | -5.000 | | -576.800 | -62.067 | | -62.067 |
| 67 | Rentuinntøkur og vinningsbýti | -277.100 | -275.500 | | | -275.500 | -1.600 | | -1.600 |
| 71 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | 391.173 | 303.100 | 0 | | 303.100 | 88.073 | | 88.073 |
| 72 | Flytingar frá landi til kommunur (land) | 124.664 | 104.000 | | | 104.000 | 20.664 | | 20.664 |
| 75 | Keyps-mvg | 575.000 | 575.000 | 0 | | 575.000 | 0 | | 0 |
| 76 | Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt | -443.193 | -157.028 | 0 | | -157.028 | -286.165 | | -286.165 |
| 77 | Flyting frá kommununum til landið | -108.491 | | -3.750 | | -3.750 | -104.741 | | -104.741 |
| 79 | Innanvirkis bókingar | 0 | | | | 0 | 0 | | 0 |
| 81 | Keyp av virðisbrøvum | 100.000 | | | 100.000 | 100.000 | 0 | | 0 |
| 82 | Útlán v.m. | 7.670 | | | | 0 | 7.670 | | 7.670 |
| 85 | Søla av virðisbrøvum | 0 | | | | 0 | 0 | | 0 |
| 86 | Afturgjaldan av útlánum v.m. | -13.212 | | | | 0 | -13.212 | | -13.212 |
| | Tilsamans | 120.323 | -7.407.428 | 487.550 | 130.950 | -6.788.928 | 6.909.251 | 2,78 | 7.101.509 |
| | Framskriving | | | | | | 192.258 | | |
| | Vøkstur 1% | | | | | | 69.093 | | 69.093 |
| | **Rakstrarútreiðsluhámark** | | | | | | **7.170.601** | **3,78** | **7.170.601** |

Talvan vísir samtyktu fíggjarlógina fyri 2025 í fyrstu røðini. Upphæddirnar í fíggjarlógini eru býttar út á sløg av útreiðslum (standardkontur). Í næstu røðunum eru játtanarsløgini ógreinað játtan (inntøkujáttanir), løgujáttan og stuðulsjáttan, ið er eyðmerkt at vera løgukend. Løgukend stuðulsjáttan snýr seg um stuðul, sum ikki løgujáttan, men stuðul til endamál, sum minnir um løgujáttan, t.d. løgustuðul til sjálvsognarstovn, innskot í tunnilsfelag o.tíl. Verða tær játtanirnar drignar frá fíggjarlógini, er restin rakstur, t.e. rakstrarjáttan, lógarbundin játtan og stuðulsjáttan, sum ikki er løgukend.

Raksturin verður síðani framskrivaður við teimum fyritreytum, sum eru nevndar í skjali 1, t.e. lønarvøkstur, prísvøkstur og javning. Í talvuni sæst, at framskrivingin er tilsamans 192 mió. kr. Síðani verður ein vøkstur á 1% lagdur afturat, sum er til allar broytingar, t.d. til raðfestingar, broytingar av fólkasamanseting o.s.fr. Hámarkið verður tilsamans um 261 mió. kr. ella út við 3,8%, sum rakstrarútreiðslurnar kunnu vaksa við í mun til fíggjarlógina fyri 2025.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá stjórnarráðunum, Landsbankanum, Gjaldstovuni, Búskaparráðnum, Landsgrannskoðanini, Vinnuhúsinum og Fakfelagssamstarvinum. Eisini hevur uppskotið ligið alment á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni at ummæla.

Fíggjarmálaráðið hevur fingið hoyringarsvar frá hesum:

- Almanna- og mentamálaráðnum
- MEGD
- Landsbankanum
- Fakfelagssamstarvinum
- Javna
- Landsverki
- Vinnuhúsinum/Føroya Arbeiðsgevarafelag
- Heilsumálaráðnum
- Búskaparráðnum
- Uttanríkis- og vinnumálaráðnum

*Almanna- og mentamálaráðið*
Almanna- og mentamálaráðið ivast í, hvat liggur í løguætlanini, at "tey fyrstu 3 árini eru at rokna sum bindandi og galda verkætlanir, sum kunnu verða liðugt projekteraðar og gjørdar klárar at koyra í útboð". Ráðið vísir á, at tað eisini má fevna um fyrireiking av øðrum verkætlanum. Ráðið vísir eisini á, at tað kann vera trupult at áseta upphæddir fyri verkætlanir í einum tíðarskeiði vegna broytingar, forskjótingar, prísbroytingar o.a. Eisini er tað óheppið at upplýsa væntaðar prísir alment áðrenn útboð.

Fíggjarmálaráðið kann vísa á, at ætlanin ikki er at áseta ítøkiligar upphæddir fyri hvørja verkætlan, men heldur, at løguætlanin snýr seg um eina mesta upphædd og helst býtta á slag av løgum. Løguætlanin skal fevna um ítøkiligar verkætlanir, men ikki upphæddirnar fyri tær. Orðingin um løguætlanina er bloytt upp nakað, soleiðis at løguætlanin fevnir um 10 ár, og at tey 3 fyrstu árini snúgva seg um verkætlanir, sum verða fyrireikaðar og/ella projekteraðar.

*MEGD*
MEGD vísir á, at fíggjarstýring ikki bara kann taka støði í peningaligum ávísum. Langtíðar búskaparligur vøkstur er úrslit av javnvág og samvirknaði millum búskaparligan vøkstur, vælferð og umhvørvi. Langtíðar mál mugu vera sett fyri vælferðina. Mælt verður til at kanna fyrimunir við at allýsa og breiðka grundarlagið undir fíggjarstýringini. Mælt verður somuleiðis til at styrkja avleiðingagreiningina. MEGD vísir á dømi um langtíðarmál við einum rúmligum arbeiðsmarknaði í Noreg. MEGD heldur, at eitt regluverk ikki skal fáa negativa ávirkan á MEGD og tílík feløg.

Fíggjarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar, men kann vísa á, at uppskotið einans snýr seg um at avmarka útreiðsluvøksturin og er ikki nøkur forðing fyri, at onnur mál verða sett fyri vælferð og vøkstur. Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at greiningin av ymiskum avleiðingum av lógaruppskotum o.tíl. má styrkjast. Rundskrivið um lógarsmíð er júst dagført og hevur brot um avleiðingar, har møguleiki eisini er fyri at gera vegleiðingar í tí sambandi.

*Landsbankin*
Landsbankin heldur, at eitt fíggjarpolitiskt regluverk eigur at fevna um salduna í fíggjarlógini, og at regluverkið eigur at fevna um 4-5 ár. Umframt eiga kommunurnar at verða fevndar. Støða eigur at verða tikin til, hvussu stór almenna skuldin kann vera.

Sum greitt er frá í broti 1.2, er enn ikki møguligt at gera eitt bygnaðarligt úrslit upp fyri tað almenna ella landið sum so. Annar møguleiki er at brúka ta faktisku salduna. Fíggjarmálaráðið ásannar, at ein avmarking í faktisku salduni hevur týdning fyri, um fíggjarlógin hevur hall. Ein avmarking í faktisku salduni tekur tó ikki hædd fyri, um tað gongur væl ella illa í búskapinum. Sum víst á, verður arbeitt við at gera eitt bygnaðarligt úrslit upp og at áseta mál í tí sambandi.

Í broti 1.3 er greitt frá, at ein fyriskipan, sum fevnir um fleiri ár, kann vera smidligari. Roknað verður tó við, at ein tílík fyriskipan er torfør at umsita, serliga tí at hægri nýtsla í einum ári ávirkar komandi árini, har tørvur júst kann vera á hægri nýtslu, umframt at fyriskipanin leggur bindingar á seinni samgongur.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at kommunurnar eiga at verða fevndar av einum fíggjarpolitiskum regluverki. Men tað krevur samráðingar við kommunurnar, umframt at neyðugt verður við ymiskum umskipanum, t.d. fyriskipan at hava eftirlit við rakstri og løgum hjá kommununum. Kommunurnar fara væntandi at hava stórar haldførisavbjóðingar komandi árini, og tað krevur tí, at partarnir síggja eitt regluverk í størri samanhangi og í mun til møguligar umskipanir av at fíggja almennu útreiðslurnar.

Tá ið ræður um lántøku, galda avmarkingar fyri kommunurnar. Tær kunnu ikki læna meira enn tað, sum svarar til árliga inntøkugrundarlagið, og tað kann ikki vera til rakstur o.tíl. Tað er ein ávís avmarking í, at landsstýrið ikki kann taka (meira) lán uttan við lóg. Spurningurin er, hvat skuld hjá landinum er. Tað eru fleiri fyritøkur, sum hava sjálvstøðugt peningarensl, og kunnu taka lán, tað veri seg partafeløg og ymiskir grunnar. Skal ein tílík avmarking geva meining, er neyðugt at taka støðu til, hvat skal telja við í skuldini, t.d. skuld hjá Realinum, Bústøðum o.ø., og um tað er ynskiligt at stýra lántøku og virksemi hjá tílíkum fyritøkum.

Landsbankin vísir á, at krøv eiga at vera til løgurnar, at tær spara rakstrarútreiðslur, at tær hava positivt kostnað-nyttu úrslit (infrakervi), og at tær bøta um fíggjarpolitiska haldførið.

Í dagførda rundskrivinum um lógarsmíð er ásett, at kostnað-nyttu meting eigur at verða gjørd av verkætlanum, sum eru upp á 100 mió. kr. ella meira. Annars skulu verkætlanir altíð verða lýstar so væl sum gjørligt við teimum avleiðingum, tær hava við sær.

Landsbankin heldur, at lønir skulu í mesta lagi verða framskrivaðar við vøkstrinum á privata arbeiðsmarknaðinum, og at aðrar útreiðslur skulu verða framskrivaðar við langtíðar inflatión.

Fíggjarmálaráðið hevur lagt seg eftir, at framskrivingarnar í mest møguligan mun samsvara við broytingarnar hjá almennum stovnum og fyriskipanum. Sum frá líður, er tað neyvan stórvegis

munur á framskrivingarháttunum. Tað er tí neyvan eitt gott hugskot at framskriva við øðrum tølum enn teimum, sum eru mest viðkomandi í almennu skipanini, tað veri seg minni ella meira.

Landsbankin metir, at tað eigur at vera lógarfest, at tá ið broytingar ella tiltøk verða gjørd, skulu inntøkur/útreiðslur av broytingunum verða framskrivaðar 20-30 ár.

Í dagførda rundskrivinum um lógarsmíð er ásett, at fíggjarligar avleiðingar av lógaruppskotum o.tíl. skulu verða lýstar 30 ár fram, í tann mun tað er hóskandi. Tað fer helst at vera ein leistur, sum kann verða brúktur í øðrum tiltøkum enn lógaruppskotum.

*Fakfelagssamstarvið*
Fakfelagssamstarvið undirstrikar, at uppskotið á ongan hugsandi hátt skal hava ávirkan á fría lønarsamráðingarrættin ella vera avmarkandi fyri lønarsamráðingar og -semjur í framtíðini.

Fíggjarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar, men skal vísa á, at uppskotið einans snýr seg um at avmarka útreiðsluvøksturin til 1% umframt framskriving fyri lønar- og prísvøkstur.

*Javni*
Javni heldur, at uppskotið hevur beinleiðis og týðandi sosialar avleiðingar fyri ein bólk av fólki, sum longu hava veikastu fíggjarligu fyritreytirnar í samfelagnum. Javni vísir á, at almennar veitingar ikki fylgja príshækkingunum, t.d. fyritíðarpensjónin. Tá ið sosial tiltøk og veitingar verða bundin av einum fíggjarligum hámarki, verður trupult at laga skipanir til veruliga tørvin. Javni heitir á landsstýrið um at tryggja, at almennar veitingar fylgja veruligum prísvøkstri, at sosialar tænastur og stuðulsskipanir verða undantiknar ella fáa serliga verju, at ein sosial eftirmeting av lógini verður gjørd áðrenn og eftir, at hon er sett í gildi, umframt at tryggja verður, at tillagingar ikki minka um rættindi sambært almannalógini og sáttmálanum um rættindi hjá fólki við breki.

Fíggjarmálaráðið tekur viðmerkingarnar til eftirtektar, men kann vísa á, at uppskotið einans snýr seg um at avmarka útreiðsluvøksturin og er ikki nøkur forðing fyri, at raðfest verður, eins og nú, innan karmarnar eftir tørvi, tað veri seg til veitingar ella tænastur.

*Landsverk*
Landsverk vísir á, at tað eru ymiskir mátar at fyrireika og bjóða verkætlanir út, og mælir til, at allir hættir verða fevnir í ásetingini um løguætlanina. Stovnurin heldur, at ein løguætlan á 12 ár fer at krevja størri innsats, men at tað samanumtikið fer at stuðla undir góðari planlegging og raðfesting. Landsverk vísir eisini á, at tað kann vera viðkomandi at lýsa tær fíggjarligu avleiðingarnar fleiri ár fram, og at kostnað-nyttu metingar verða gjørdar í sambandi við infrakervisverkætlanir. Slíkar kanningar eiga at verða umhugsaðar í hvørjum einstøkum føri.

Orðingin um løguætlanina er bloytt upp nakað, soleiðis at løguætlanin fevnir um 10 ár, og at tey 3 fyrstu árini snúgva seg um verkætlanir, sum verða fyrireikaðar og/ella projekteraðar. Tað er vituligt, at ein løguætlan fer at krevja meira av bæði umsitingini og politisku skipanini, men roknað verður við, at fyriskipanin við tíðini hevur við sær betri planlegging og samskipan í mun til byggivirksemið og tað búskaparliga annars. Landsverk hevur ein týðandi leiklut í arbeiðinum.

Í dagførda rundskrivinum um lógarsmíð er ásett, at kostnað-nyttu meting eigur at verða gjørd av verkætlanum, sum eru upp á 100 mió. kr. ella meira. Annars skulu verkætlanir altíð verða

lýstar so væl sum gjørligt við teimum avleiðingum, tær hava við sær. Lógaruppskot skulu verða lýst við fíggjarligum avleiðing komandi árini, upp í 30 ár fram, um tað er viðkomandi.

*Vinnuhúsið/Føroya Arbeiðsgevarafelag*
Arbeiðsgevarafelagið kundi ynskt sær, at kommunurnar vóru við. Felagið heldur, at uppskotið ikki tálmar nóg mikið, og at tørvur er á øðrum supplerandi reglum til at røkka endamálinum. Uppskotið tekur ikki atlit at rationaliseringum; trygd er ikki fyri, at pengarnir ikki verða brúktir aðrastaðni. Størsta avbjóðingin er, at eingin tileggjan er at halda aftur í almennum lønum, tí at lønarútreiðslurnar kunnu vaksa við avtalaða almenna lønarkarminum + 1%. Sama er við øðrum útreiðslum. Felagið heldur, at trupulleikin við hesum parti er, at tað als ikki er vist, at inntøkur landskassans vaksa í sama mun.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at kommunurnar eiga at verða fevndar av einum fíggjarpolitiskum regluverki. Men tað krevur samráðingar við kommunurnar, umframt at neyðugt verður við ymiskum umskipanum, t.d. fyriskipan at hava eftirlit við rakstri og løgum hjá kommununum. Kommunurnar fara væntandi at hava stórar haldførisavbjóðingar komandi árini, og tað krevur tí, at partarnir síggja eitt regluverk í størri samanhangi og í mun til møguligar umskipanir av at fíggja almennu útreiðslurnar.

Tað er ikki uppgávan við hesum regluverki, at virksemið hjá landinum skal minka sum so, men hevur uppskotið við sær, at rakstrarvøksturin verður tálmaður. Verandi virksemið skal rúmast innan ásetta hámarkið, tað veri seg í mun til broytingar í fólkasamansetingini og krøv til ymisk tilboð í einum vælferðarsamfelag. Tað er torført í sær sjálvum at halda tílíkar útreiðslur innan ein vøkstur á realt 1%. Tað er tí ikki rúmd fyri, at lønir og aðrar útreiðslur vaksa meira hjá landinum enn í samfelagnum annars, heldur tvørturímóti. Ratiónaliseringar eru neyðugar, soleiðis at landið ikki hevur (ov stórt) hall.

Fíggjarmálaráðið hevur lagt seg eftir, at framskrivingarnar í mest møguligan mun samsvara við broytingarnar hjá almennum stovnum og fyriskipanum. Sum frá líður, er neyvan nakar munur á, hvussu nógv almennar og privatar lønir vaksa, tó at tað kann koma forskotið. Tað er tí neyvan eitt gott hugskot at framskriva við øðrum tølum enn teimum, sum eru mest viðkomandi í almennu skipanini, tað veri seg minni ella meira.

Felagið vísir til OECD-tilmæli og heldur, at neyðugt er við javnvág millum inntøkur og útreiðslur (budget target), og at skiftandi inntøkur (windfall revenues) verða javnaðar yvir nøkur ár. Eitt fíggjarpolitiskt regluverk skal javna konjunkturávirkanina og eigur at virka konjunkturmótgangandi. Uppskotið ásetir ikki, at rakstrarhall ikki skal verða fíggjað við láni (golden rule). Eykajáttanir mugu haldast innan regluverkið. Felagið mælir til ein innbygdan trekleika, soleiðis at vøksturin byggir á fleiri ár ella privatar lønir. Somuleiðis mælir felagið til fleirárliga strukturella javnvágsreglu, t.d. 5 ár.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at vælferðarsamfelagið hevur avbjóðingar at fáa javnvág millum útreiðslur og inntøkur vegna týðandi broytingar í fólkasamsetingini og nýmótans krøv, um fólk skulu tíma at búgva í Føroyum. Ásannað verður, at tað ikki ber til at hækka inntøkurnar frá skatti og avgjaldi. Fíggjarmálaráðið heldur hinvegin, at útreiðslurnar eiga at verða tálmaðar í mun til ynskta virksemið, soleiðis at meira fæst fyri hvørja krónu. Tað er eisini eitt mál í sær sjálvum, at virksemið í samfelagnum er støðugt, og tað er eisini partur av endamálinum við at halda raksturin støðugan, men at vøksturin verður tálmaður.

Fíggjarmálaráðið kann vísa á, at tilfeingisinntøkur verða javnaðar yvir 7 ár sambært lóg um Búskapargrunnin. Eykajáttanir eru eisini fevndar av hesum uppskotinum. Somuleiðis arbeiðir Fíggjarmálaráðið við møguleikum at avmarka lántøku og at gera strukturella úrslitið upp. Tað kann vera ein gongd leið at royna at fáa javnvág yvir fleiri ár, men tað kunnu eisini vera stórir trupulleikar við tílíkari fyriskipan í einum lítlum landi sum Føroyar, har sveiggini raka harðari enn í einum størri búskapi, umframt at tað hevur ávirkan á seinni ár, tá ið onnur samgonga er, ella at tørvur er á at hava hall, men at "kvotan" er brúkt uppá árini frammanundan.

*Heilsumálaráðið*
Ráðið spyr, nær Búskaparráðið kemur við fráboðan um, hvørt rakstrarvøksturin er í samsvari við hámarkið, og hvussu farið verður fram, um rakstrarvøksturin verður staðfestur at vera hægri enn hámarkið. Eru demografiskar broytingar partur av 1% í rakstrarvøkstri. Somuleiðis spyr ráðið, hvussu tryggjað verður, at løguætlanin verður hildin (serliga tey 3 fyrstu árini).

Fíggjarmálaráðið kann vísa á, at Búskaparráðið leggur sjálvt sítt virksemi til rættis, men tað er upplagt, at tílík fráboðan kemur í sambandi við, at figgjarlógin verður løgd fram og verður samtykt. Onnur høvi kunnu vera, t.d. størri broytingar við eykajáttan. Verður farið upp um hámarkið, hevur landsstýrisfólkið í fíggjarmálum skyldu at leggja broytingaruppskot ella eykajáttanaruppskot fram, sum tryggja, at rakstrarvøksturin er í samsvari við hámarkið. Tær demografisku broytingarnar eru partur av 1% í rakstrarvøkstri. Er neyðugt við t.d. at hækka játtanina til eina byggiverkætlan, má upphæddin finnast við at gera tillagingar innan hámarkið fyri løguætlanina.

*Búskaparráðið*
Búskaparráðið heldur, at 1% í realum vøkstri er høgt, serliga tá ið avmarkingar ikki eru um úrslit ella skuld. Uppskotið til fíggjarpolitiskt regluverk kann tí geva politisku skipanini ein falskan tryggleika. Ráðið vísir á, at kommunurnar eiga at verða fevndar av regluverkinum, soleiðis at land og kommunur samskipa almennu fíggjarætlanirnar uppá stutt og langt sikt.

Tað er torført at áseta hámark fyri reala vøksturin í rakstrarútreiðslunum. Til samanberingar er Grønland við 0,5% rakstrarvøkstri. Í Føroyum er vøkstur í fólkatali og -samanseting. Onnur lond hava m.a. útreiðsluloft, sum ikki beinleiðis er knýtt at prosentum. Fíggjarmálaráðið heldur, at eitt hámark skal ikki vera alt ov torført/ómøguligt at halda.

Fíggjarmálaráðið ásannar, at kommunurnar eiga at verða fevndar av einum fíggjarpolitiskum regluverki. Men tað krevur samráðingar við kommunurnar, umframt at neyðugt verður við ymiskum umskipanum, t.d. fyriskipan at hava eftirlit við rakstri og løgum hjá kommununum. Kommunurnar fara væntandi at hava stórar haldførisavbjóðingar komandi árini, og tað krevur tí, at partarnir síggja eitt regluverk í størri samanhangi og í mun til møguligar umskipanir av at fíggja almennu útreiðslurnar.

Búskaparráðið vísir á, at endamálið við fíggjarpolitiskum regluverki er at styrkja stýringina, so at sleppast kann undan einari óndari ringrás við ótálmaðari skuld, men heldur goyma "krútið" til, tá ið veruligur tørvur er á tí. Størsti mangulin við uppskotinum er, at ongin áseting er um hall í fíggjarlógini, og at ongin avmarking er fyri lántøku.

Fíggjarmálaráðið skal vísa á, at arbeitt verður við uppskotum, t.d. at avmarka lántøku og at gera bygnaðarligt úrslit upp og áseta mál í tí sambandi. Í løtuni ber ikki til at gera bygnaðarliga úrslitið upp, og tí ber ikki til at áseta mál um bygnaðarliga javnvág. Viðvíkjandi lántøku er spurningurin, hvat skuld hjá landinum er. Tað eru fleiri fyritøkur, sum hava sjálvstøðugt

peningarensl og kunnu taka lán, tað veri seg partafeløg og ymiskir grunnar. Skal ein tílík avmarking geva meining, er neyðugt at taka støðu til, hvat skal telja við í skuldini, t.d. skuld hjá Realinum, Bústøðum o.ø.

Búskaparráðið heldur, at uppgávurnar hjá ráðnum at áseta hámark fyri rakstarvøkstri og eftirlit í tí sambandi er eitt slag av "outsourcing" av einari mekaniskari rokniuppgávu, sum í dag liggur hjá Fíggjarmálaráðnum. Tað er ikki ein hóskandi uppgáva hjá Búskaparráðnum, og kann eisini geva ein falskan tryggleika til politisku skipanina við, at ráðið blástemplar eitt hámark.

Fíggjarmálaráðið tekur til eftirtektar, at uppgávan at áseta hámarkið út frá útrokningum, sum ráðið longu ger, liggur hóskandi hjá Fíggjarmálaráðnum. Men Fíggjarmálaráðið heldur fast við, at uppgávan at hava eftirlit við, um hámarkið verður hildið, liggur væl hjá Búskaparráðnum. Tað er ikki hóskandi, at Fíggjarmálaráðið hevur eftirlit við sær sjálvum.

*Uttanríkis- og vinnumálaráðið*
Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur onga viðmerking.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur við sær, at útreiðslurnar hjá landinum ikki kunnu vaksa meira enn eitt ásett hámark. Somuleiðis ber ikki til at minka um skatta- og avgjaldsgrundarlagið, uttan at nýggjar inntøkur verða ásettar í lóg. Er talan um netto minni inntøkur, verður munurin drigin frá í hámarkinum fyri, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar kunnu vaksa.

Fyriskipanirnar hava við sær ein tálmandi virknað, men tað ber ikki til ítøkiliga at meta um, hvussu stóra ávirkan uppskotið fer at hava á framtíðar fíggjarlógir.

Uppskotið hevur meira arbeiði við sær fyri Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið. Metast má um, hvørt játtanirnar skulu tillagast nakað.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur meira arbeiði við sær fyri Fíggjarmálaráðið og Búskaparráðið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna, uttan tað at landið tálmar útreiðslunum nakað.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Eingir tvørgangandi millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

### 2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, og ger ikki onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Heimildirnar hjá landsstýrisfólkinum í fíggjarmálum knýta seg at teimum heimildunum, sum landsstýrisfólkið annars hevur at leggja fram fíggjarlóg o.tíl. Búskaparráðið fær heimild at áseta eitt hámark fyri vøkstri í rakstrarútreiðslunum hjá landinum út frá fyritreytum í lógini og skal somuleiðis kanna eftir, um vøksturin í rakstrarútreiðslunum er í samsvari við hámarkið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar við sær.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
*Viðvíkjandi § 7 a*
Uppskotið hevur við sær, at rakstrarútreiðslurnar hjá landinum ikki kunnu vaksa meira enn 1% í mun til rakstrarútreiðslurnar í fíggjarlógini undanfarna ár, umframt framskriving fyri lønar- og prísvøkstur.

Rakstrarútreiðslurnar fevna um allar útreiðslurnar, sum eru í fíggjarlógini, og sum ikki eru løguútreiðslur ella inntøkur. Uppskotið leggur upp til, at tað skal vera einfalt at eyðmerkja rakstrarútreiðslurnar, og at tað skal vera lætt at finna upphæddirnar fram í Búskaparskipanini. Rakstrarútreiðslurnar fevna um øll játtanarsløg uttan:

- Ógreinað játtan (inntøkujáttanir)
- Løgujáttan
- Stuðulsjáttan, sum er eyðmerkt at vera løgukend (løgustuðul, innskot o.tíl.)

Rakstrarútreiðslur fevna tí um rakstrarjáttanir, stuðulsjáttanir (ikki løgukendar) og játtanir, sum eru lógarbundnar.

Rakstrarútreiðslur, sum verða framskrivaðar, fevna um hesi høvuðssløg:

- Høvuðsslag 1 (Rakstrarútreiðslur)
- Høvuðsslag 2 (Rakstrarinntøkur)
- Høvuðsslag 5 (Flytingarútreiðslur, tó bara tilskot til einstaklingar)

Útreiðslusløgini 7 (flytingar millum almennar myndugleikar) og 8 (fíggjarpostar) verða ikki framskrivað. Talan er netto um flytingarinntøkur o.tíl.

Vøksturin í komandi fíggjarári verður roknaður í mun til samtyktu fíggjarlógina árið fyri. Kravið um hámarksvøksturin knýtir seg at øllum tíðarskeiðinum, t.e. uppskot til fíggjarlóg, samtykt fíggjarlóg, eykajáttanir og fíggjarnevndarskjøl. Tað hevur við sær, at fíggjarlógin árið eftir altíð skal halda hámarkið. Er t.d. neyðugt við eykajáttan, er neyðugt at finna pening innan verandi játtanir.

Búskaparráðið hevur til uppgávu at kanna eftir, um fíggjarlógin lýkur kravið um at vera undir hámarkinum. Kemur Búskaparráðið til ta niðurstøðu, at vøksturin í fíggjarlógini er ov høgur, áliggur tað landsstýrisfólkinum í fíggjarmálum at leggja uppskot fyri Løgtingið, sum ger, at vøksturin kann vera í samsvari við hámarkið.

Eitt serligt dømi kann vera, at landið antin letur frá sær ella yvirtekur málsøki. Er talan um verandi virksemi, sum ikki hevur við sær raðfestingar ella meirútreiðslur, kann útreiðslustøðið ella hámarkið verða tillagað broyttu fyritreytunum. Tað eigur at verða mett um tað í hvørjum einstøkum føri. Frávik frá reglunum um hámark fyri útreiðsluvøkstri kunnu t.d. verða ásett í lógini um yvirtøkuna.

*Viðvíkjandi § 7 b*
Inntøkurnar hjá landskassanum, tó ikki rakstrarinntøkur, sum eru partur av stovnsrakstri o.ø., eru skipaðar undir § 20 í fíggjarlógini og fevna um játtanarslagið:

- Ógreinað játtan (inntøkujáttanir)

Tær allarflestu inntøkurnar eru frá skatti og avgjaldi, sum eru ásett í lóg. Uppskotið hevur við sær, at verða tílíkar inntøkur minkaðar við lóg, skulu samsvarandi inntøkur koma í staðin. Ein munur verður drigin frá í hámarkinum fyri, hvussu nógv rakstrarútreiðslurnar kunnu vaksa.

Tað ber til broyta eina lóg, sum hevur við sær størri inntøkur frá skatti ella avgjaldi. Inntøkan kann tó ikki verða brúkt til hækka hámarkið fyri, hvussu stórar rakstrarútreiðslurnar kunnu vera. Hinvegin ber til at gera broytingar, sum hava við sær minni útreiðslur og minni inntøkur.

*Viðvíkjandi § 7 c*
Uppskotið hevur við sær, at løguútreiðslurnar ikki kunnu vera hægri enn tað, sum er ásett í samtyktu løguætlanini. Landsstýrið leggur uppskot til samtyktar fyri Løgtingið um løguætlan áðrenn 1. apríl á hvørjum ári. Aðalmálið við løguætlanini er at fáa politiska semju um og raðfesting av, hvørjar løgur skulu verða framdar komandi árini innan ein karm, og at arbeiðið at fyrireika og fremja verkætlanirnar verður so gott og ódýrt sum møguligt.

Løguútreiðslurnar fevna um játtanarsløgini:

- Løgujáttan
- Stuðulsjáttan, sum er eyðmerkt at vera løgukend (løgustuðul, innskot o.tíl.)

Løguútreiðslurnar eru vanliga á hesum høvuðssløgum:

- Høvuðsslag 3 (Løguútreiðslur)
- Høvuðsslag 4 (Løguinntøkur)

Sum sæst í talvuni undir broti 1.4, eru løguútreiðslur eisini á øðrum høvuðssløgum, t.d. á standardkontu 16 Leiga, viðlíkahald og skattur og standardkontu 81 Keyp av virðisbrøvum.

Løguætlan fyri landið skal verða viðgjørd politiskt so breitt sum møguligt. Uppskot verður síðani lagt fyri Løgtingið fyri 1. apríl á hvørjum ári. Fyrsta løguætlanin er fyri árini 2027-2038.

Endamálið við løguætlanini er at skipa løguverkætlanirnar hjá landinum betur. Tað er bæði fyri at halda verkætlanirnar innan karmin og at raðfesta samsvarandi, men eisini fyri at fyrireika verkætlanirnar betur og at fremja tær á skynsamasta hátt.

Tað ber ikki til enn at siga neyvt, hvussu løguætlanin skal verða sett upp. Men ætlanin er, at tær verkætlanirnar, sum verða raðfestar, verða tiknar við í løguætlanina. Roknað verður ikki við, at ítøkiligar upphæddir verður tiknar við fyri hvørja einstaka verkætlan og fyri hvørt ár. Men møguleiki er fyri at seta upphæddir av til sløg av verkætlanum. Ein mesta upphædd verður ásett fyri allar løgur í hvørjum ári.

*Viðvíkjandi skjali 1*
Lønarvøksturin er grundaður á sáttmálar, sum eru gjørdir við Fíggjarmálaráðið, og sum røkka inn í komandi ár. Er neyðugt at meta um lønarvøksturin, skal metingin verða gjørd av, hvat lønarvøksturin hevði verið fyri landið. Tekur lønarvøksturin í privatum sáttmálum hædd fyri lønarvøkstri undanfarin ár, skal metingin taka hædd fyri tí, soleiðis at metingin bert snýr seg um komandi ár fyri landið.

Fíggjarmálaráðið, 18. desember 2025

**Ruth Vang**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**

Fylgiskjal 1: Almanna- og mentamálaráðnum
Fylgiskjal 2: MEGD
Fylgiskjal 3: Landsbankanum
Fylgiskjal 4: Fakfelagssamstarvinum
Fylgiskjal 5: Javna
Fylgiskjal 6: Landsverki
Fylgiskjal 7: Vinnuhúsinum/Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 8: Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 9: Búskaparráðnum
Fylgiskjal 10: Uttanríkis- og vinnumálaráðnum